UTTAN ÚR HEIMI

## 2000 sjófuglar doyðu

Umhvørvismyndugleikarnir í Hordalandi í Noregi halda, at vanlukkan við farmaskipinum "Rocknes" fyri trimum mánaðum síðani kostaði umleið 2.000 sjófuglum lívið.

"Rocknes" holvdist, júst sum skipið var á veg igjøgnum Vatlestraumen nakað norðan fyri Bergen tann 19. januar. Stein Byrkjeland, sum hevur eftirlitið við umhvørvinum í Hordalandi, sigur við norska útvarpið, at bara nakrir fáir deyðir fuglar eru riknir upp á land, men á hesum leiðunum eru gjáir og holur, sum nógvur deyður fuglur kann vera rikin inn í. Við at samanbera sjófuglin nú og undan vanlukkuni er hann komin til, at einir 2.000 munnu hava latið lív.

Stein Byrkjeland heldur ikki, at tað ber til at tosa um eina umhvørvisvanlukku, og hann væntar ikki, at teir ymsu sjófuglastovnarnir hava fingið nakað størvegis mein av tilburðinum.

## Veðurmenn skulu sektast

Ein ráðharri í Russlandi krevur nú, at veðurmenn, sum koma við skeivum forsagnum um veðrið, skulu rinda endurgjald.

Sergej Shoigu, ið sum ráðharri hevur ábyrgdina av tilbúgvingini í sambandi við náttúruvanlukkur, sigur, at hann fer at virka fyri, at veðurmenn fáa bót, halda forsagnir teirra ikki. Ja, hann er sinnaður at seta fram krav um, at óálitandi veðurmenn kunnu fáa fongsulsrevsing.

Ráðharrin kom við krøvum sínum í einari røðu, sum hann helt í býnum Irkutsk í síðstu viku. Serjeg Shoigu segði, at hvørja ferð veðurmenninir boða frá eitt nú vatnflóð, senda myndugleikarnir alla hugsandi útgerð á staðið. Tað kostar nógvar pengar, men heldur forsøgnin um vatnflóðina ikki, er tað eingin, sum hugsar um at revsa veðurmenninar, segði hann. Men nú skal annað skil koma á, lovaði hann.

## Húsaprísurin hækkar

Í Danmark hevur húsa prísurin verið hækkandi tey seinastu árini, og sambært tølum hjá Realkreditráðnum hækkar hann framvegis.

Hækkingin er kortini ikki so stór longur, sigur ráðið. Prísurin á summarhúsum og øðrum frítíðarhúsum er hækkaður 3,3 prosent í ár, prísurin á vanligum sethúsum og raðhúsum er hækkaður 1,3 prosent, og íbúðirnar eru vorðnar 1,6 prosent dýrari síðani á nýggjárinum. Tað er kortini ikki vantandi eftirspurningur, sum er orsøkin til tann lutfalsliga lítla prísvøksturin. Í fyrsta ársfjórðingi í ár vóru húsa- og íbúðasølurnar 23 prosent fleiri í tali enn í sama ársfjórðingi í fjør.

Tølini hjá Realkreditráðnum vísa, at tann størsti prísvøksturin á vanligum sethúsum og raðhúsum hevur verið í Jyllandi. Í Norður- og Suðurjyllandi eru húsini vorðin 2,9 prosent dýrari, og í Ribe Amti er húsaprísurin hækkaður 4,2 prosent hetta seinasta árið.

## Margretha fær nýggjan bil

Margretha drotning hevur gjørt av at keypa sær ein nýggjan bil í sambandi við krúnprinsabrúdleypið í næsta mánað.

Frederiksborg Amts Avis skrivar, at drotningin hevur keypt sær ein bil av slagnum Bentley Amage, og hann skal hon hava ístaðin fyri tann ellivu ára gamla Rolls-Royce Silver Spur II, sum hon hevur nýtt tey seinastu árini.

Sambært bláðnum hevur tann nýggi bilurin ullteppi á dúrkinum, alt innan er klætt við oksahúð, og borð og instrumentpanel eru úr valnøtatræi. Bilurin vigar hálvttriðja tons og kann koyra 250 kilometrar um tíman. Sum vera man er øll nútímans útgerð í bilinum, sum sambært Frederiksborg Amts Avis kostar umleið seks milliónir krónur.

# Diplomatar geva Blair ein dyggan frammaná

**52 fyrrverandi bretskir diplomatar leggja bretska forsætisráðharran undir at hanga uppi í amerikanska forsetanum sum eitt huppaskjúrt**

BRETLAND
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



*Tony Blair fær eina rimmar skortfleingju frá nógvum av teimum fremstu bretsku diplomatunum*
*Mynd: Reuters*

Tað er ikki á hvørjum degi, at bretskir diplomatar alment finnast at landsins stjórnarleiðara. Men nú hava 52 fyrrverandi sendiharrar, hákommiserar og guvernørar skrivað eitt bræv, og tað er synd at siga, at teir halda nógv av bretska politikkinum í Irak ella bretska lutinum í friðarroyndunum í Miðeystri.

- Vit hava við veksandi stúran fylgt við tí politikki, sum tú hevur rikið í tøttum samstarvi við USA, bæði tá tað snýr seg um Irak og trupulleikarnar ímillum ísraelsmenn og arabar, skriva teir millum annað í brævinum til Tony Blair.

Teir 52 fyrrverandi diplomatarnir siga, at vónir vóru um frið í Miðeystri, tá Bush, forseti, kom við sínari ofta umrøddu friðarætlan, men nú er eingin vón longur, siga teir.

- Einki er gjørt fyri at fáa gongd á samráðingarnar ella at tálma harðskapinum. Bretland og hini londini, sum tóku undir við friðarætlanini, hava bara sitið hendur í favn og bíðað eftir, at USA fór at gera okkurt, men tey hava bíðað til fánýtis, skriva diplomatarnir.

Teir finnast eisini hvassliga at ísraelsku avgerðin at taka seg aftur úr Gaza, men ikki av Vestara Áarbakka, og teir fýlast eisini á, at amerikanski forsetin tók undir við avgerðini. Teir vilja vera við, at avgerðin er beinleiðis ólóglig, og teir siga seg ikki ivast í, at hon fer at krevja meiri ísraelskt og palestinskt blóð.

- Misnøgd okkara við ísraelsku avgerðina gerst uppaftur størri, nú vit skilja, at tú hevur tikið undir við henni. Við hesum hevur tú slept teimum prinsippunum, sum tey seinastu fýra árini hava verið grundarlagið undir øllum altjóða royndum at fáa frið í Miðeystri, skriva diplomatarnir.

Teir eru minst líka hvassorðaðir, tá tað snýr seg um kríggið í Irak. Teir vilja vera við, at teir, sum gjørdu av at leypa á Irak, høvdu als ikki gjørt sær greitt, hvat skuldi henda, tá Saddam Hussein var fallin. Og Blair verður lýstur sum ein, ið bara gongur aftan á Bush, og at Bretland onga ávirkan hevur havt á amerikanska politikkin

- Eftir okkara tykki hevur júst slík ávirkan stóran týdning. Kunnu amerikanararnir ikki góðtaka bretska ávirkan, ella vilja teir ikki verða ávirkaðir, er eingin orsøk til at styðja ein politikk, sum er miseydnaður frammanundan, skrivar teir 52 í brævinum til Tony Blair.

Ímillum teirra, sum hava skrivað undir brævið, eru tríggir fyrrverandi bretskir sendiharrar í Irak, fleiri fyrrverandi diplomatar í arabiskum viðurskiftum, fyrrverandi ST-sendiharrar, fyrrverandi sendiharrar í Moskva og serliga bretski sendimaðurin í Afghanistan.

# Saddam fekk vitjan á føðingardegnum

**Fyrrverandi irakski forsetin fylti 67 nú um dagarnar. Eitt umboð fyri Reyða Kross var og vitjaði hann**

IRAK
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Hetta er aðru ferð, at umboð fyri Reyða Kross hava tosað við Saddam Hussein, síðani amerikanararnir tóku hann tann 13. desember í fjør.

Amerikanararnir vilja ikki siga, hvar fyrrverandi forsetin er, og tað vil Reyði Krossur heldur ikki. Talsmaðurin hjá Reyða Krossi í Geneve, Ian Piper, váttaði fyri Reuters í gjár, at eitt umboð fyri felagsskapin hevði verið og tosað við Saddam Hussein, men hvar teir hittust,. vildi hann ikki siga.

Eitt umboð fyri Reyða Kross var og vitjaði Saddam Hussein fyri tveimum mánaðum síðani. Ta ferðina fekk umboðið eitt bræv við sær, sum Saddam hevði skrivað døtrum sínum, sum búgva í Jordan. Hvar tær báðar konurnar, tann triðja dótturin og tann yngsti sonurin eru, veit eingin at siga við vissu. Teir báðir eldru synir Saddams, Uday og Qusay, doyðu í skotbardaga við amerikanskar hermenn seinasta summar.



NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Olaf Johannessen fingið virðisløn

**Nevndin fyri Olaf Poulsens Minde hevur givið føroyska sjónleikaranum Olaf Johannessen Olaf Poulsens Mindelegat, sum er ein peningagáva á 30.000 krónur**

MENTAN
*Marjun Dalsgaard*



*Lesa meria um sjónleikaran, Olaf Johannessen, í stórari samrøðu í blaðnum í morgin*

Mikudagin varð Olaf Poulsens Mindelegat handað føroyska sjónleikaranum, Olaf Johannessen. Virðislønin hevur verið givin sjónleikarum í fleiri ár har í millum hava Bodil Kjær, Githa Nørby, Buster Larsen, Ulla Henningsen og Aksel Erhardtsen, í fjør varð hon handað Lars Mikkelsen.

- Hetta er eitt herðaklapp, og eg eri sera fegin um tað, serliga tí tað kemur frá starvsfeløgum, og tað hevur stóran týdning fyri meg, at teir viðurkenna mítt arbeiði, sigur Olaf Johannessen. Í nevndini fyri Olaf Poulsens Mindelegat sita sjónleikarir, journalistar og ein sakførari.

Olaf Johannesen hevur so at siga fingið sjónleikin inn við móðurmjólkini. Hann var sum barn mangan í sjónleikarahúsinum við pápanum Eyðun Johannessen, og har sat hann kvøld eftir kvøl og eygleiddi leikararnar, meðan teir vandu.

- Eg var sera hugtikin av hesum, at tú kanst siga eina søgu við at brúka teg sjálvan, og eg elskaði hendan serliga dámin í Sjónleikarahúsinum, fortelur hann.

Fyrstu fer Olaf stóð á palli, var hann 17 ár, tað var í leikinum Hatursfuglar, og stutt eftir hevði hann høvuðsleiklutin í Skógardrongurin.

- Eg havi nokk altíð vitað, at eg vildi vera sjónleikari, men tað var ikki fyrr enn, eg var 18 ár, at eg gjørdi av, at tað skuldi vera mítt yrki - so fór eg á sjónleikaraskúla í 1982 - eg var annars í læru sum krambakallur, greiðir hann frá. Hann hevur altíð lati hugin stýrt yrkisleiðini, og tað førdi millum annað við sær, at hann takkaði nei til eitt starv á Kongaliga Teatrinum, tí hann hevði fingið høvuðsleiklutin í Hamlet, sum skuldi setast upp í Århus árið eftir.

- Tað var sera óheppið, serliga av tí at eg fyrst hevði sagt ja, men eg vildi so fegin royna Hamlet - eg sá ein stóran møguleika í tí leiklutinum. Hugurin og forvitni er drívemegin, og tað hevur altíð verið tað, sum er avgerandi fyri meg, leggur hann aftrat.

**Lesið meira um sjónleikaran, Olaf Johannessen, í stórari samrøðu í blaðnum í morgin.**

### Blá bók

Olaf Heine Johannesen
Føddur 08.07.1961
Ùbúgvin á Sjónleikaraskúlanum í Odense í 1986
Århus Teater 1986-1994
Det Kongelige Teater fra 1994 til 2004
Á Kongaliga Teatrinum hevur Olaf Johannessen millum annað hevur verið við í leikunum Richard III, Livet er en drøm, Engle i Amerika I og II, Prinsen af Homburg, Kjartan og Gudrun, Jesus, Menneskereden, Fønikerinderne, Det' skam hun er en mær, Fostbrødrene, Ci-vi-li-sa-tion, Gengangere, Sparekassen, Urene hænder, Celestina, Lyden af skyer og Den stundesløse. Á Århus Teater var hann millum annað við í Hamlet, har hann hevði høvuðsleiklutin, Roberto Zucco og Gengangere. Har umframt hevur Olaf Johannessen verið við í I hired a Contract Killer á Mammutteatret og Dæmonernes port á Odense Teater, eins og hann var við í Morten Korch sjónvarpsrøðini á TV2.




*Fløgan »Harmonikutúrurin« er komin út í sambandi við, at 10 ár eru liðin síðani fyrsta harmonikutúrin við Norrønu*

# »Harmonikutúrurin« á fløgu

**10 ár eru síðani fyrsta harmonikutúrin við Norrønu, og í hesum sambandi er komin út fløga við 19 harmoniløgum**

HARMONIKUTÚRUR

Nú eru liðin tíggju ár síðani, at fyrsti harmonikutúrurin við Norrønu varð gjørdur. hesum helt Pauli Jacobsen tað vera hóskandi at gera nakað burtur úr – og tí er fløgan, »Harmonikutúrurin«, vorðin veruleiki.

– Hesin túrurin hevur stóran sosialan týdning – bæði fyri tónleikarar og ferðafólk, og tað skal vera mín vón, nú vit hava fingið nýtt skip, at undirtøkan verður eins góð og undanfarin ár, sigur Pauli Jacobsen, sum hevur skipað fyri túrunum.

Hann takkar øllum tónleikarum, ferðafólkum o. ø., sum hava verið við til at gjørt hesar túrir minniligar.

Á fløguni er 19 løg – eins og tað hevur verið vanligt at hava gestatónleikarar við á Harmonikutúrunum, so eru eisini gestatónleikarar við á fløguni, sum plátufelagið Tutl hevur givið út.

**el**

Fyri 25 árum síðan:

# William Heinesen fekk H.C. Andersens legat í 1979



Rithøvundurin William Heinesen (1900-1991) fekk tillutað "H.C. Andersens legat" upp á 10.000 krónur. Handanin fór fram á føðingardegi hansara 2. apríl 1979.

Tað var nevndin í danska rithøvundafelagnum, sum tillutaði 79 ára gamla William Heinesen virðislønina.

Onnur sum hava fingið hesa virðislønina eru t.d.: Tom Kristensen, Benny Andersen, Karl Bjarnhoff og Tove Ditlevsen.

*Kelda: Myndaárbókin – árið ið fór 1979*

# Almanna- og heilsurøktarafelagið nýggjan formann



Majbritt Mohr er nýggjur formaður í Almanna- og heilsurøktarafelagnum.

Hon avloysir Mamy Dahl Sørensen, ið hevur verið formaður seinastu tvey árini. Mamy er nú leiðari á Dagtilhaldinum í Klaksvík.

Majbritt Mohr er 30 ára gomul, gift og eigur 3 børn. Hon varð útbúgvin almanna- og heilsuatstøðingur í Hillerød í 1998.

Í nevndini eru nú:
Majbritt Mohr, Tórshavn, formaður
Mamy Dahl Sørensen, Viðareiði
Marita Sivertsen, Klaksvík
Sunneva Tyril, Norðragøtu
Eyðna Hansen, Kaldbak
Eykalimir eru:
Elisabeth Hentze, Tórshavn
Anna-Britt Eið, Hvalba

### Dagurin

**29. apríl. Pætur blóðvitnismaður**, deyður í 1252. Dagurin hevur navn eftir einum dominikanamunki, sum varð myrdur av fíggindum í Milano.